## 150 HM-tímar í SvF

Sjónvarpið fer at senda umleið 150 tímar av fótbólti frá HM-endaspælinum í Týsklandi, og tað fær sjálvsagt stóra ávirkan á skránna hjá Sjónvarpinum. Teir allar flestu HM-dystirnir verða sendir beinleiðis. Í innleiðandi kappingini verður sum oftast ein dystur klokkan tvey, ein klokkan fimm og ein klokkan átta. Teir verða allir sendir beinleiðis. Í sambandi við dystin um kvøldið er HM-studio kl. 19.30 við ymiskum tilfari frá sjálvum endaspælinum, og stundum verða eisini føroyskar meiningar um dystirnar í sjónvarpsstovuni.

Av teimum 64 dystunum í HM-endaspælinum eru tað bara fýra dystir, ið Sjónvarpið ikki sendir í fullari longd. Dystirnir verða sendir í samstarvi við Danmarks Radio og TV2. Setanardysturin verður á Alliance leikvøllinum í München næsta fríggjadag. Hann er millum vertirnar úr Týsklandi og Kosta Rika. Finalan verður á olympiska leikvøllinum í Berlin sunnudagin 9. juli.

## Oddsini frá Dansk Tipstjeneste

***Hvør kemur víðari úr bólki D***

| | |
|---|---|
| Portugal og Mexico | 1.20 |
| Portugal og Angola | 6.50 |
| Portugal og Iran | 6.50 |
| Mexico og Angola | 11.00 |
| Mexico og Iran | 11.00 |
| Angola og Iran | 90.00 |

## Bólkur D

### ANGOLA

**Málverjar**
Pereira Joao Ricardo
Joao Marmona Lama
Hipolito Mario

**Verja**
Marcos Airosa
Joao Jamba
Antonio Lebo-Lebo
Carlos Kali
Manuel Rui Marques
Manuel Loco
Luis Delgado
Abreu Marco

**Miðvøllur**
Paulo Figueiredo
Andre Macanga
Andre Mateus
Nobre Edson
Jose Ze Kalanga
Marcos Milloy
Titi Buengo

**Álop**
Pedro Manuel Mantorras
Fabrice Akwa
Antonio Mendonca
Armado Flavio
Arsenio Love

### PORTUGAL

**Málverjar**
Alexandre Ricardo
Silva Quim
Jorge Paulo Santos

**Verja**
Renato Paulo Ferreira
Marco Caneira
Miguel Ricardo Costa
Renando Meira
Luis Miguel
Jorge Nuno Valente
Alberto Ricardo Carvalho

**Miðvøllur**
Francisco Costinha
Luis Figo
Armando Petit
Hugo Viana
Cristiano Ronaldo
Nuno Maniche
Cardoso Tiago
Anderson Deco

**Álop**
Pedro Pauleta
Sabrosa Simao
Luis Boa Morte
Miguel Nuno Gomes
Helder Postiga

### MEXICO

**Málverjar**
Oswaldo Sanchez
Jose de Jesus Corona
Guilermo Ochoa

**Verja**
Claudio Suarez
Carlos Salcido
Rafael Marques
Ricardo Osorio
Jose Antonio Castro
Mario Mendez
Andre Guardado
Francisco Rodriques

**Miðvøllur**
Gerardo Torrado
Antonio Zinha
Pavel Pardo
Ramon Morales
Gonzalo Pineda
Rafael Garcia
Jesus Arellano
Luis Perez

**Álop**
Jared Borgetti
Guillermo Franco
Francisco Fonseca
Omar Bravo

### IRAN

**Málverjar**
Ebrahim Mirzapour
Hassan Roudbarian
Vahid Talebloo

**Verja**
Sohrab Bakhtiarizadeh
Yahya Golmohammadi
Rahman Rezaei
Hossein Kaabi
Sattar Zare
Amir Hossein Sadeqi
Mohammad Nosrati

**Miðvøllur**
Javad Nekounam
Ferydoon Zandi
Ali Karimi
Andranik Teymourian
Javad Kazermeian
Mehrzad Madanchi
Massoud Shojaei

**Álop**
Mehdi Mahdavikia
Vahid Hashemian
Ali Daei
Rasoul Khatibi
Arash Borhani
Reza Enayati

# Ronaldo er sterkasta vápnið

**Cristiano Ronaldo dugir meira enn bara at lata føturnar dansa rundan um bóltin. Hann skapar málkjansir, ger mál og er tann spælarin, sum Portugal setir stórst álit á til HM-endaspælið**

**HM-BÓLKUR D**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

21 ára gamli Cristiano Ronaldo fær ein lyklaleiklut á portugisiska landsliðnum undir HM-endaspælinum í Týsklandi. Hóast hann er ungur og spælri við í sínum fyrsta HM-endaspælið, verður roknað við, at hann veruliga fer at gera um seg.

Skjóti og vandamikli vongspælarin úr Manchester United telist millum teir bestu og mest undirhaldandi spælararnar í Premier League. Hann dugir øll finturnar, hevur sjálvur ment síni egnu tricks, hann ger mál, hann skapar kjansir, og so er hann altíð til reiðar at arbeiða hart fyri liðið.

Cristiano Ronaldo hevur tað mesta, og nógv av tí skapandi spælinum hjá Portugal verður litið honum upp í hendurnar. Víst hevur Portugal framúr góðar spælarar sum Luis Figo og Deco, men tað verður trupult at fjala út yvir, at Ronaldo er sterkasta vápnið hjá Portugal.

### Til reiðar at lumpa

Tá ið Cristiano Ronaldo fyri nøkrum árum síðani kom til Onglands at spæla, eftir at Manchester United venjarin Alex Ferguson sá hann í einum venjingardysti í USA, varð sagt, at Ronaldo bara undirhelt áskoðarunum. Hann fekk ov lítið burtur úr sínum evnum og gjørdi ov nógv av við fintum og driblingum.

Men um hetta var veruleikin fyri trimum árum síðani, so er tað í øllum førum ikki soleiðis longur. Sanniliga kann hann dansa rundan um bóltin, tá ið hann leikandi lætt strýkur fram eftir vøllinum, men hann kemur sanniliga eisini í nógvar góðar støður, har hann antin kann leggja upp til málkjansir ella skora sjálvur. Og hann dugir at gera mál – bæði við skotum og við stútarum.

Cristiano Ronaldo er væl fyri, nú HM stendur fyri framman, og hann hevur okkurt spennandi trick við sær til Týsklands.

– Eg royni alla tíðina at betra mínar fintur og driblingar, og undir hvørjari venjing arbeiði eg við hesum. Eg havi nøkur tricks við mær, men tað hevur størstan týdning fyri meg, at eg kann brúka finturnar til okkurt skilagott til frama fyri liðið. Annars hava teir einki at siga, sigur Cristiano Ronaldo.

### Figo liðformaður

Portugal stóð seg væl til EM-endaspælið á heimavølli fyri tveimum árum síðani. Liðið kom í finaluni, men tapti tepurt fyri Grikkalandi. Síðani tá eru fleiri broytingar gjørdar á liðnum, og nú er bert Luis Figo eftir av gylta ættarliðnum hjá Portugal.

Og Figo hevur fingið liðformansbandið um armin. Hann hevði eina uppgerð við venjaran Scolari fyri tveimum árum síðani, men venjarin hevur stórt álit á sínum 34 ára gamla miðvallarin, sum hóast hann ikki er tann sami, sum hann var fyri fýra árum síðani, kann bæði eitt og annað í týðandi dystum.

Á miðvøllinum hjá Portugal verður eisini spælstýrarin Deco at finna. Deco, sum varð føddur í Brasil, men hevur fingið portugisiskt pass, er lyklaspælari á liðnum hjá Barcelona, og á landsliðnum hevur hann eisini fingið uppgávuna sum sentralur miðvallari. Nógv av spælinum hjá Portugal skal umvegis Deco, sum eisini dugir at gera mál við skotum úti frá.

Luis Felipe Scolari hevur eitt sera sterkt landslið við sær til Týsklands. Eindin er væl skipað og robust, og so hevur liðið eisini einstaklingarnar, sum kunnu gera tann veruliga munin í teimum avgerandi dystunum.



*Cristiano Ronaldo dugir bæði eitt og annað við einum fótbólti, men hann sigur sjálvur, at eru hansara fintur og driblingar ikki til frama fyri liðið, so kunnu tær gera tað sama*

*Mynd: Scanpix*